Summarkapping 2007

# Túrurin fram við Themsen

**Túrurin fram við Themsen ánni var sera áhugaverdur og spennandi, tí fleiri av mest kendu og mest vitjaðu støðunum í London liggja nevniliga fram við ella tætt við ánna**

SUMMARKAPPINGIN
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Ein av síðstu døgunum í London vaknaðu vit tíðliga á morgni, og tá vit hugdu út í gjøgnum vindeygað, sóu vit, at veðrið enn einaferð var av tí allarbesta. Sólin skein, og ikki eitt skýggj var at síggja á luftini. Vit gjørdu av at fara ein túr inn at hyggja at býnum og onkrum av teimum áhugaverdu støðunum, sum London hevur at bjóða.

Vit gingu til nærmastu undirgrundarbreyt, har vit so valdu at taka túrin heilt inn í miðbýin, har vit fóru av tætt við Tower of London. Málið hjá okkum var at ganga ein túr fram við Themsen ánni, har vit ætlaðu at hyggja eitt sindur eftir fleiri av teimum søguliga støðunum, sum standa fram við ánni.



*Vit sóu nógv spennandi á túrinum fram við Themsen. Har var bæði Tower of London, West Minister Abbey, London Eye, Parlamentsbygningurin, Big Ben og Downing Street, so hetta var ein spennandi og áhugaverdur dagur*

### Slottið og brúgvin

Tá vit komu upp úr undirgrundarbreytini, sóu vit beinanvegin, at vit vóru heilt tætt við Tower of London, har vit ætlaðu at byrja okkara túr henda dagin.

Stóra slottið stóð bert fáar hundrað metrar frá okkum, og kring slottið stóðu túsundtals fólk og tóku myndir ella hugnaðu sær. Nógv valdu eisini at taka túrin inn á slottið, har tey kundu síggja eitt sindur av tí, sum hevur gingið fyri seg har upp ígjøgnum tíðirnar.

Tower of London bleiv bygt í 1078, so tað hevur næstan 1000 ár á baki. Slottið hevur m.a. verið nýtt av teimum kongaliga, tað hevur verið fongsul, og síðani 1303 hevur tað húsa teimum ensku krúnjuvelunum.

Tá vit høvdu verið ein túr runt um slottið, gingu vit yvir á London Bridge, ið var fyrsta brúgvin, sum bleiv bygd yvir um Themsen. Nógv halda, at Tower Bridge er tann gamla, søguliga brúgvin, men so er ikki. Tower Bridge bleiv bygd í 1894, meðan London Bridge bleiv bygd av rómverjunum fyri á leið 2000 árum síðani. Hon er bæði brotin, dottin og brend niður, men hvørja ferð hava bretar bygt hana uppaftur, og tann dag í dag stendur hon sum eitt søguligt minni hjá bretum um gamlar dagar.

### Frá Big Ben til Tony Blair

Tá vit vóru komin yvir um London Bridge, gingu vit vestur ímóti London Eye, parlamentsbygninginum og West Minister Abbey. Veðrið var avbera gott, so tað bilti einki, um túrurin var nakað langur.

Tá vit høvdu gingið í ein tíma nærkaðust vit London Eye. Har stóðu nógv fólk í røð fyri at sleppa inn, og vit hildu tað ikki loysa seg at fara í ta longu røðini. Vit settu okkum í staðin á eina fløtu undir London Eye, meðan vit eygleiddu tað stóra eyga, har man sær yvir allan býin.

Tá vit høvdu sitið eina løtu, valdu vit at fara yvir um ánna til tann risastóra parlamentsbygningin, sum hýsir helst kendastu klokku í heiminum, Big Ben. Vit fóru eisini afturum parlamentsbygningin at hyggja eftir kendu kirkjuni, West Minister Abbey.

Tá vit høvdu sæð kirkjuna, var túrurin fram við Themsen at kalla liðugur. Vit ætlaðu at enda túrin hjá okkum á Trafalgar Square, og vit valdu at ganga frá West Minister Abbey og Big Ben niðan á Trafalgar Square. Á vegnum gingu vit eisini fram við Downing Street, har sum enski Premier Ministarin býr.

Eina lítla løtu seinni stóðu vit uppi á Trafalgar Square. Nú nærkaðist kvøldið, men vit valdu at seta okkum niður her at njóta tær síðstu sólstrálurnar henda dagin saman við øllum dúgvunum, sum gingu runt ímillum øll fólkini. Hetta hevði verið ein sera góður dagur, har vit høvdu upplivað fleiri av teimum kendastu støðunum í London.






www.sansir.fo

Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600,
Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari